**EG MEINI TAÐ**

# Tá ið sannleikin verður lutfalsligur



*Peter O. K. Olofson skrivar*

Er hin kristna játtanin altíð røtt? Er hin evangelisk-lutherska játtanin altíð røtt? Neyvan, um ein skal trúgva einari samrøðu í Sosialinum 18/5-2002. Ein prædika yvir høvuðsprestabøn Jesu elvdi nevniliga til tær stóru yvirskiftirnar, og fingu vit at vita, at "tað er skeivt altíð at halda seg hava rætt". Men um vit sum kristin og sum evangelisk-luthersk ikki halda, at vit hava rætt — og harvið tala satt —, tá ið vit koma við játtan okkara, so mugu vit annaðhvørt broyta støðu ella tvíhalda um, at spurningurin um sannleika og lygn ikki longur hevur hin stóra týdningin. Tað er kanska júst henda relativisma, sum er sjúkdómur fólkakirkjunnar. Tað er ein sjúkdómur til deyðan. Ikki neyðturviliga fyri fólkakirkjuna sum stovn, men sum kristin kirkja. Hin kristna játtanin doyr nevniliga av hesum sjúkdómi. Tað er munur á at vera sannførdur um, at tað, ein lærir, er rætt, og so tann sanna, rætta og neyðuga ásannanin av, at vit menniskju kunnu fara skeiv. Um kirkjusamfeløg ikki longur mugu halda, at alt, hvat ið tey læra, er rætt, so kann eisini hin evangelisk-lutherska kirkjan (og harvið prestar fólkakirkjunnar) bara boða ein relativan t.e. lutfalsligan sannleika. Men ein lutfalsligur sannleiki er ein lívslygn. Ein lutfalsligur sannleiki er ein avnoktan av tí gudgivnu opinberingini í Hini heilagu Skriftini og harvið av absoluttunum t.e. teimum treytaleysu sannleikunum. Men tað er kanska tí, at teir treytaleysu sannleikarnir eru við at hvørva út úr fólkakirkjuni. Tað ræður ikki longur um eitt stríð fyri sannleikan ímóti lygnini, men um ymiskar lutfalsligar hugsanir. Valdstríð, hugnaður og tekkingarhugur koma í staðin fyri stríðið um at standa í sannleikanum og tala satt.(Men vei tó honum ella henni, sum loyvir sær at finnast at tí ráðandi lutfalsligu hugsanini. Tá gongst tað sum á døgum Luthers, tá ið Luther skrivaði ímóti Erasmusi: "Ta einu løtuna vilt tú ikki hava, at tað skal vera nakað, sum við fastleika sannføringarinnar verður boðað at vera sannleiki, og ta næstu løtuna vilt tú tó taka teg út sum tann, ið við myndugleika sigur, hvat ið sannleikin er.")

Tað ljóðar frómt, men er tað aloftast ikki, tá ið sagt verður, at kristin skulu vera eitt, men ikki eins.

Var tað um eygna- ella hárlit, hædd ella vekt, so sigur tað seg sjálvt, at heldur ikki kristin hvørki kunnu ella skulu vera eins. Men tað er vanliga ikki tílíkar náttúrugivnar munir, ið talað verður um.

Var tað um, at nøkur kristin betur kunnu dáma Kingo-sang og onnur rytmiskan tónleik, nøkur vilja fegin lova Guði við hevjaðum hondum, meðan ið onnur dáma betur ikki at hevja tær, nøkur vilja fegin klappa til ein sang uppímillum, onnur helst ikki, nøkur taka eina urgu framum, onnur ein gittara, íðan, so loysti og loysir tað tá at fáa sagt, at heldur ikki her skulu kristin vera eins. Vit hava ongan myndugleika til at krevja tað at vera einsháttað í kristinheiminum, tá ið talan er um "smag og behag". Her er tað rúm fyri mongum, mongum ymiskleikum. Kærleikin gevur frælsi og hevur fyrilit (1. Kor. 8-10). Men tað er vanliga heldur ikki henda mun, ið talað verður um.

Tað er um tað, at tað verður lært ymiskt, og so verður sagt, at vit skulu vera eitt, men ikki eins. Hvar stendur tó tað í Hini heilagu Skrift? Tað stendur sjálvandi ongar staðir. Tann einleiki, sum talað verður um í høvuðsprestabøn Jesu, hevur fyrimynd sína í einleikanum millum Faðirin og Sonin, og er tað ein einleiki í sannleika og ikki í lygn. Faðirin og Sonurin læra í roynd og veru tað sama.

Lat okkum bara avdúka tað: Tað finst í veruleikanum bara ein kristin kirkja. Øll kristin hoyra til Jesu Kristi kirkju. Eitt er, at hin

*framhald á síðu 8*

**Vikuskifti**

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

# "I will be waiting in the moonlight"



**KONSERT**

*Tekst og myndir:*
*Fríi Eidesgaard Mikkelsen*
*Sjúrður Rein*
*Eirikur Jákupsson*

Aqua. »I am a Barbie Girl in a Barbie world, its fantastic, its fantastic«...... Snjøllu tónarnir frá undantónleikinum, áðrenn Brandur Enni kemur á pallin hoyrast langt út í regnið. Øll eru líka spent og tað eru eisini tríggir dreingir Innan av Gøtu í Havn, sum eru á veg til konsert við Branduri Enni í Badmintonhøllini fríggjakvøldið í seinastu viku. Teir ganga í sjeynda flokki. Og teir skriva soleiðis til Sosialin um konsertina:

Beint áðrenn man slapp inn í høllina har í Brandur Enni skuldi synga, stóðu tveir menn inni í eitt lítlum rúmi og tóku ímóti billettum. Tá ið man kom inn í ta stóra høllina hoyrdi man tónleik hjá Aqua úr stórum hátalarum og einum stórum sterioanleggi sum var í mittuni. Har vóru eisini proppetandi fult av fólki, sum vóru pent ílatin. Fleiri dreingir vóru í víðum buksum og flottum T-shirtum og almindiligum jakka og onkrar gentur í trompetbuksum, niðurdeili um miðjuna og eisini í T-shirt. Inni í høllini var eisini eitt ógvuliga stórt ljos-show við øllunum møguligun litum og har var eisini eitt lit roykshow. Har var eisini ein lítil handil í hjørninum sum seldi forskellig klæðir við navninum hjá Brandi Enni á, har vóru húgvur, t-shirt, keppar og fløgur og mangt annað. Man kundi koma klokkan kvart yvir átta og Brandur skuldu byrja klokkan níggju. Fyrst komu nakrir dansarar á pallin og dansaðu fyri publegum, og so kom massar av royki, og so kom Brandur inn á pallin og byrjaði at syngja "I will be waiting in the moonlight." Og tá hoyrdi man væl, at tað vóru uml. 600 fólk í høllini. Tá ið konsertin var liðug, fór Brandur Enni niður av senuni, og hann fekk næstan ikki gingið, tí har vóru so nógv fólk, og allar genturnar søgdu: »Tú ert ordiliga fittur og lekkur.«

Hann fór síðan til eitt borð og fór at skriva avtugraffar og har stóð hann leingi, meðan øll vildu hava hann at skriva navnið. Onkur á armin, onkur á pappír. Í meðan dansaðu dansararnir og kórið sang. Og so fóru tey at rudda og øll fóru eisini heim tá.







*Michael Jacobæus, sum er býargartnari, sigur, at tað er sera umráðandi at planta trøini tætt, so at tey geva lívd fyri vindinum. Ein slík roynd er gjørd við bygningin hjá SEV í Havn.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Planting við einum endamáli

## — Tað er neyðugt at fara strategiskt til verka, tá ein fer undir at planta urtagarðin, sigur røktarleiðarin hjá býráðnum í Havn, Michael Jacobæus, sum í mong ár hevur fingist við urtagarðar. Hann veit, hvussu umráðandi tað er at planta trø, sum geva lívd fyri tí nógva vindinum í Føroyum

**VÁRIÐ**
*Stefan í Skorini*

Áhugin fyri urtagarðinum og plantum økist nógv júst hesa tíðina á árinum, tá fólk aftur fáa hug at fara út í urtagarðin at dálka fingrarnar.

– Eg haldi, at tað er sera umráðandi, at fólk leggja eina ætlan frammanundan, hvussu tey ætla sær, at urtagarðurin skal síggja út, sigur royndi urtagarðsmaðurin Michael Jacobæus. Hann er útlærdur landslagsarkitektur ella urtagarðsfrøðingur.

Michael Kjøller Jacobæus hevur urtagarðarnar hjá kommununi í Havn um hendi. Nógvar vakrar blettir í Havn hevur hann saman við arbeiðsmonnum hjá kommununi gjørt, og tað er mangan ein frægd fyri eygað hjá okkum, ið ganga framvið ella njóta góðveðrið í einum urtagarði. Hansara uppgáva er at skipa fyri røktini av urtagørðum í býnum, og hann stendur eisini fyri nýggjari planting.

Í hesum døgum fáa fólk størri áhuga fyri urtagarðinum og fyri at plantum sum heild, nú landslagið grønkast og blómur spretta. Í hesum sambandi hava vit fingið Michael at geva okkum nøkur góð ráð.

**Trøini skulu plantast tætt**

At planta trø hevur fleiri góð endamál. Eitt er, at trøini hjálpa móti vakstrarhúsárininum, sum hitar jarðarklótuna upp. Annað er, at trø eru vøkur at síggja í landslagnum. Tað triðja er, at tey geva góða lívd fyri tí nógva vindinum, sum vit hava í Føroyum.

— Trøini taka broddin av tí ringasta, tá nógvur vindur er, og tað kann hava stóran týdning fyri restina av urtagarðinum, sigur Michael, sum vísir á, at tá farið verður undir at planta urtagarð, so skal fyrst hugsast um at geva garðinum lívd fyri vindi.

Hetta gerst best við at planta nógv trø tætt saman. Hetta hevur við sær, at restin av urtagarðinum fær frið, og umstøður av vaksa betrast munandi. Tað er umráðandi, at trøini standa tætt saman, tí annars fæst ikki tann rætta lívdin. Trø og buskar skulu plantast tætt í fleiri røðum við harðbalnum plantum.

Eitt mistak, sum nógv fólk hava lyndi til at gera, er, at trøini standa spjadd runt, og tí sleppur vindurin ov lættliga ígjøgnum. Fólk hava ofta hug at planta eitt træ í senn og síðani fylgja við, hvussu tað gongur tí, áðrenn tey planta fleiri, men hetta er skeiv mannagongd.

Um man býr í einum øki við nógvum vindi, skal man fyrst leggja seg eftir skapa lívd við at planta trø og bíða við at planta tær veikaru planturnar. Saman við einum góðum hegni fæst góð lívd eftir 5-7 ár.

Fleiri urtagarðar í Havnini liggja í lívd fyri vindinum, og Michael vísir okkum nakrar, sum liggja í lívd aftanfyri trø, sum eru sett í jørðina við júst tí fyri eygað.

— Tað ber altíð til at finna tey røttu træsløgini, sum hóska til júst tín urtagarð, tí sløgini eru so nógv, og vit hava tey flestu her í Føroyum, sigur Michael.

Hann vísir á, at ein skúlagarður, sum áður lá sera ábart, nú er vorðin ein blettur við stilli, eftir at trø eru plantað framvið garðinum.

**Broytir veðurlagið**

Michael vísir eisini á, at føroyingar ikki skulu apa sær eftir urtagørðum, sum teir hava sæð í útlondum, har vøksturin er heilt øðrvísi. Hetta ber ikki til í Føroyum vegna serliga veðurlagið. Heldur skal man leggja seg eftir at hava harðførar plantur og trø, sum klára seg í føroyska veðurlagnum.

– At planta nógv trø kann broyta veðurlagið á einum lítlum bletti. Hetta hava vit fleiri dømi um. Vit síggja til dømis í økjum við nógvum nýggjum húsum, at vindurin fær fríari ræsur, tí fólk enn ikki hava havt tíð at planta trø. Í økjum, har fólk hava plantað nógv trø, er hinvegin fjálgari, tí trøini kunnu beinleiðis broyta mikroveðurlagið á einum lítlum bletti.

Fólk bíta sjáldan merki í ta ovurstóru ávirkan, sum trø kunnu hava á nærumhvørvið og urtagarðin.

Í hesum sambandi nevnir gartnarin ta lítlu viðarlundina við Vesturkirkjuna. Har eru grønur bøur við trøum rundan um. Har leita fólk sær mangan ein góðan summardag, tí trøini geva góða lívd, og tí er næstan altíð stilli á einum slíkum stað.

Michael Jacobæus gevur fólki tey ráð, at tað er umráðandi at ráðføra seg við onkran, sum hevur kunnleika til urtagarðar og plantur, um man er í iva, áðrenn farið verður undir at planta trø. Hetta gevur altíð besta úrslitið.

Ein svensk kanning vísir, at hús við tøttum vøkstri rundanum spara nógvan hita. Sparingin kann vera so stór sum 30 prosent, so peningur er eisini at spara í plantingini.

**Lítið arbeiði**

Fólk eru ofta bangin fyri, at trøini krevja størri orku at røkja enn ein grasvøllur. Hesum vísir hann tó aftur, tí tá trøini einaferð hava fingið eina ávísa hædd, passa tey seg sjálv. Ein grasvøllur skal hinvegin sláast minst einaferð um vikuna í summarhálvuni alt lívið. Trøini krevja eitt sindur tey fyrstu árini, men krevja síðani ikki tað stóra.

Røktarleiðarin heldur, at tað er umráðandi, at fólk verða upplýst um, hvussu tey skulu fara fram í urtagarðinum, og tí er hetta sera aktuelt at tosa um hesa árstíðina.

Hann vísir harumframt á, at trøini áttu at verið gagnnýtt nógv meira á stovnum, sum hevði givið børnum betri møguleikar at vera uttandura, og kring ítróttarøki í Føroyum. Stovnar eru farnir undir hetta, men hann nevnir vøllin í Gøtu, sum eitt dømi, har trø kundu givið nógva lívd fyri vindi.

Hann minnist afturá, at fyri 20-30 árum síðani vóru fleiri, ið hildu, at trø als ikki vóru hóskandi í Føroyum, men hetta sjónarmiðið hoyrist ikki nógv til longur.

— Tað ber til at leggja nágreiniligar ætlanir fyri, hvussu urtagarðurin skal vera, áðrenn farið verður at planta, og at planta trøini tøtt er sera umráðandi, sigur Michael Jacobæus at enda.

– Um urtagarðuin verður væleydnaður er tengt at, at tú velur tær røttu planturnar til júst hetta endamálið, at tú fyrireikar moldina, sum tú plantar í, og at tú hjálpir plantunum ávegis við at lúka og taða, sigur Michael Jacobæus.